## Lærarar til Føroya Læraraskúla

Føroya Læraraskúli, sum hevur læraraútbúgving og pedagogútbúgving, søkir eftir lærarum komandi skúlaárið í hesum lærugreinum:

| | |
|---|---|
| enskum | ( 6 tímar) |
| týskum | ( 6 tímar) |
| landalæru | ( 6 tímar) |
| søgu | ( 6 tímar) |
| donskum | (10 tímar) |
| lívfrøði/náttúru | ( 9 tímar) |
| smíð | (15 tímar) |
| samtíðarkunning | ( 3 tímar) |
| skriving | (1 1/2 tími) |
| ítrótt (kvinna) | ( 7 tímar) |
| føroyskum | ( 5 tímar) |
| drama | ( 2 tímar) |
| námsfrøði/serlestri | (10 tímar) |
| samfelagsfrøði | ( 4 tímar) |
| kristni (einans heysthálvuna) | (11 tímar) |

Vikutímatalið er viðmerkt aftanfyri hvørja lærugrein. Møguleiki kann vera fyri fastari setan.

Størvini verða sett frá 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu skjalprógva neyðugan undirvísingarførleika. Innlit og royndir í undirvísing á lærara- og pedagogútbúgving eru ein fyrimunur.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Magistarafelag Føroya og Føroya Landsstýri.

Áhugað, sum vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara, tlf. 313501, teldupostsamband paulini@flsk.fo

Umsóknirnar skulu stílast til Føroya Læraraskúla, Postrúm 348, FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er úti 18. mai 2000.

**Tórshavn 27. apríl 2000**


**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

**BERGUR Á REYNATRØÐ**

Børkuvegur, 620 Runavík

**Tlf. 448480**

Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



**sosialurin -har tað hendir**


## NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN

Vilt tú vera pedagogur?

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytirnar fyri upptøku á **námsligu útbúgvingina** eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið 9 ár í skúla hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. juni.

NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN

*– ein útbúgving fyri lívið*

## LÆRARA-ÚTBÚGVINGIN

Vilt tú vera lærari?

Nú er tíð at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Lærara-skúlanum (tlf. 313501). Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 15. juni.

LÆRARAÚTBÚGVINGIN

*– ein útbúgving fyri lívið*


**Urtagarðsarbeiði**

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt v/Mass Jensen, Nólsoy**

Tlf. 32 71 31 – 28 39 53


## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 3 ára gamlan drong í Eysturoynni við Downs Syndromi.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður í Kongshavnar Barnagarði í Saltangará og í heiminum.

– at stimbra dronginum við spæli og venjingum og annars verða við til at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag, einsamøllum og saman við øðrum. Stuðulin skal eisini kunna fara við honum til fysioterapi o.a. uttanfyri stovnin.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna, Almannastovuna og onnur fakfólk.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður 30 tímar um vikuna.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir við børnum. Setunartíðin er frá uml. 22.05.00.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi í seinasta lagi 12.05.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
Att.: Bettina Christiansen
Heiðavegur
600 Saltangará

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til 31 48 22 til Ragnhild Dahl.

## Dagstovnurin í Kvívík

Søkt verður við hesum eftir pedagogum til »Dagstovnin í Kvívík«, at byrja frá 15. august 2000.

Eitt starv fulla tíð (40 tímar) og eitt starv 3/4 tíð (30 tímar).

Umsóknir, við møguligum ummælum, skulu vera inni í seinasta lagi 14. mai 2000 og stílast til Kvívíkar kommunu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á stovninum, Súsannu Holm á tlf. 421660.

**Kvívíkar kommuna**

## Timburmenn søkjast

Søkt verður eftir timburmonnum, til arbeiði í Keypmannahavn og Jýtlandi, góð løn verður givin.

- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Møguleiki fyri akkordarbeiði

**Sp/f Fær-Byg**
826 Trongisvágur
Tlf. 372626 & 210626






# TórRek 2000 letur upp í dag

*Í dag letur framsýningin TórRek 200 upp í Norðurlandahúsinum*

JÁKUP MØRK

Hetta er triðja árið á rað, at TórRek, ella RekTór sum tað eitur tá stevnan er í Reykjavík, verður hildin. Harumframt var undan hesum eisini hildin sølustevna í grønlendska høvuðsstaðnum undir heitinum NuuRek.

Sum tað framgongur av nøvnunum, so er talan um samstarv millum høvuðsstaðirnar í útnorðuri. Sum liður í at útbyggja hetta samstarv enn meira, verður í løtuni arbeitt við at skipa fyri sølustevnu í Nuuk komandi ár, sum ætlandi skal bera heitið NuuTórRek.

Einki er at taka seg aftur í, at stevnurnar seinnu árini hava havt stóra ávirkan á samhandilin millum Føroyar og Ísland. Ein samhandil, sum er munandi øktur seinnu árini. Tað kann kanska tykjast løgið, at handilin millum londini ikki hevur verið størri, tí mentunarliga, landa- og lívfrøðiliga liggja londini ógvuliga nær hvørjum øðrum, og tí skuldi ein kanska hildið, at tað eisini var náttúrligt at samhandilin millum londini var rættuliga stórur.

Svávar Ottoson, stjóri hjá Eimskip í Føroyum, ásannar eisini, at tað kann tykjast eitt sindur løgið, at samhandilin og samskiftið landanna millum ikki hevur verið størri undanfarnu árini, men hann leggur kortini áherslu á, at TórRek stevnan og líknandi sølustevnur avgjørt hava havt sína ávirkan í menningini av hesum.

Sjálvur hevur hann nú starvast her á landi í eini trý ár, og hann ivast ikki í, at samhandilin er sera nógv øktur hesa tíðina.

- Ikki bara við farmi, sum er okkara øki, men á øllum økjum er ein munandi menning farin fram, sigur Svávar, og vísir millum annað á økta talið av flogferðum, økt handilsligt samband, økt politiskt og mentunarlit samstarv sum dømi um hetta.

Tað er Eimskip, sum saman við Íslendska útflutningsráðnum

# Nýggjur oljubólkur

*Hóast oljufeløg hava avgjørt ikki at vera við í 1. útbjóðing við Føroyar,. so tykist áhugin at vera við kortini at vera stóru*

JAN MÜLLER

Tey fýra oljufeløgini, Statoil, Enterprise Oil, Philips Petroleum og Veba Oil hava skipað seg í bólk við tí fyri eygað at bjóða í fyrsta føroyska útbjóðingarumfarinum.

John Inderhaug, leitingarstjóri hjá Statoil sigur við Sosialin, at hetta hendir eftir, at Mobil, sum teir áður hava samarbeitt við á Føroyaøkinum, nú er lagt saman við Exxon.

Statoil heldur fram sum operatørur í bólkinum. Tey trý oljufeløgini, Statoil, Mobil og Enterprise eru helst tey, sum hava arbeitt longst og brúkt flest pengar á Føroyaøkinum. Tað eru nógv ár síðani, at AMG-bólkurin segði seg vera kláran til at bora eftir olju.

John Inderhaug er fegin um at hava fingið Philips og Veba uppí bólkin, nú Mobil tók seg aftur. Hann metir, at broytingin hvørki ger bólkin betri ella verri. Mobil var eitt stórt felag, men eisini Phillips hevur nógvar royndir á Atlants mótinum og er ein góður partnari. Veba Oil er kanska ikki so kent, men hevur leingi fylgt gongdini í Føroyum og hevur arbeitt saman við danska Mærsk Olie og Gas. Veba er partur av tí fyrrverandi týska felagnum Deminex, sum herfyri fór í tvey. Tann eini parturin, Veba hevur heimstað í Onglandi.

John Inderhaug sigur, at teirra bólkur fer at vera við í 1. útbjóðing. Arbeitt verður nú við at skriva umsókn.

Tað er enn ógreitt, hvussu verður við heimsins største oljurisa ExxonMobil, men keldur í oljuverðini vilja vera við, at tað er heilt óvist, um felagið í heila tikið verður við í føroysku útbjóðingini. Frammanundan hevur enn eitt stórt oljufelag, Shell tikið seg úr Føroyaøkinum.

Hjá ExxonMobil hava tey onga aðra viðmerking í løtuni enn hesa -Ringið aftur tá umsóknarfreistin er úti.

### Kortini stórur áhugi

Hóast einstøk feløg ikki vera við í fyrsta útbjóðingarumfari, so eru tað framvegis nógv feløg, sum fara at bjóða. Talan er um í hvussu er fýra bólkar við tilsamans umleið 13 feløgum. Bólkarnir eru : Amerada Hess, Dong, British Gas og Atlantic Petroleum - Texaco, Conoco og Murphey - Norsk Hydro (Saga Føroyar) og Anadarco og síðani Statoil, Phillips, Enterprise og Veba. Aftrat hesum hevur BP Amoco boðað, at tað ætlar sær at lata inn umsókn einsamalt. Feløg, sum ætla at vera við, men enn ikki hava gjørt av, hvønn bólk tey ætla sær uppí ella um tey lata inn umsókn einsamøll er italska felagið Agip og amerikanska Marathon.

Aftrat hesum er so føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni, sum hevur samstarvsavtalur við Dana í Onglandi og Sagex í Noregi.

### Chevron ikki við

Spurningurin hevur so eisini verið, um onnur feløg, sum ikki hava víst føroyska økinum stóran ans higartil, fóru at vera við í útbjóðingini, tá treytirnar blivu kunngjørdar. Eitt nú hevur verið gitt, at stóra oljufelagið Chevron kanska fór at vera við. Men frá Chevron frættir Sosialurin, at teir vera ikki við í 1. útbjóðing við Føroyar. Felagið brúkar so nógva orku uppá norska landgrunnin, at pláss er ikki fyri at vera við í føroysku runduni eisini.

Í vikuni bórust annars tey tíðindi, at stóra franska oljufelagið TotalFina og Elf ikki verður við í útbjóðingini orsakað av innanhýsis ósemju í sam starvinum við Norsk Hydro og Anadarco.

Mærsk verður ikki við.
Lesið á síðu 5


HEIMA BIO



Deep Blue Sea

Generalens datter

I Kina spiser de hunde

VIDEOTOP 10

VIKA 17

1 Star Wars Den usynlige fjende
2 She's all that
3 Deep Blue Sea
4 Sex Games
5 I Kina spiser de hunde
6 Runaway Bride
7 Generalens datter
8 EDtv
9 Eyes Wide Shut
10 Mumien

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

STATOIL

*støðirnar kring landið*

petur & petur 320870